**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan** (Ásetingar um 10. flokk, samfelagsfrøði, kravda tímatalið í 1. – 9. flokki, skúlasamstarv millum kommunur, skúlasamalegging, at víðka ásetingarnar um royndar- og granskingarverkætlanir og at gera dagføringar í tilvísingum í lógartekstinum)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(Ásetingar um 10. flokk, samfelagsfrøði, kravda tímatalið í 1. – 9. flokki, skúlasamstarv millum kommunur, skúlasamanlegging, víðka ásetingarnar um royndar- og granskingarverkætlanir og at gera dagføringar í tilvísingum í lógartekstinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 10. mai 1990, løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2000, løgtingslóg nr. 53 frá 9. mai 2005, løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007, løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, løgtingslóg nr. 157 frá 18. desember 2017 og løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 4 verður sum nýtt stk. 2 sett: "*Stk. 2.* 10. flokkarnir verða landafrøðiliga skipaðir í 7 skúlasamstørv. Í minsta lagi 15 næmingar skulu verða innskrivaðir, áðrenn 10. floks skúlasamstarv verður skipað."

2. Í § 4 verður sum nýtt stk. 3 sett: "Stk. 3. Kommunur, sum hava 10. flokk, søkja landsstýrimannin um góðkenning at skipa skúlasamstarv sbrt. stk. 2."

3. Í § 4 verður sum nýtt stk. 4 sett: "*Stk. 4.* Í kommunum, har óhøglig farleið er hjá næmingum at fara í 10. flokk í einum grannaskúla, verður 10. flokkur varðveittur, hóast næmingatalið er lægri enn 15 næmingar."

4. Í § 4 verða stk. 2 - 10 eftir hetta stk. 4 – 13.

5. Í § 5, stk. 2 í pkt. 1 verður eftir "søgu/samtíð" sett: " samfelagsfrøði 7. – 9 skúlaár."

6. Í § 19 verður sum nýtt stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Kravda undirvísingartímatal næminganna í hvørjum flokki í 1. - 9. flokki verður frá 1. august í 2019 lækkað við tveimum tímum um vikuna."

7. Í § 19 verða stk. 3 – 8 eftir hetta stk. 4 – 9.

8. Í § 31 verður stk. 2 orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Skúlasamband millum kommunur um 8. – 10. flokk og aðrar flokkar kann verða skipað í einum skúla í skúlasambandinum, tó verður skúlasamband, sum bara fatar um 8. – 10. flokk skipað í einum skúla, sum frammanundan hevur 8. – 10 flokk."

9. Í § 31 verður sum nýtt stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Leiðarin í skúlanum, sum hevur 8. – 10. flokk, kann eisini vera leiðari fyri skúlasambandinum sbr. stk. 2."

10. Í § 31 verður sum nýtt stk. 4 sett: "*Stk. 4*. Kommunurnar í skúlasambandinum velja eitt stýri at fyrisita skúlasambandið sbr. stk. 2 og áseta í sáttmála talið av limum, og hvussu einstøku kommunurnar verða umboðaðar."

11. Í § 31 verður sum nýtt stk. 5 sett: "*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum góðkennir undirvísingarliga partin, og landsstýrismaðurin í kommunumálum góðkennir umsitingarliga og fíggjarliga partin í sáttmálum sbrt. stk. 4."

12. Í § 31 verður stk. 2 eftir hetta stk. 6.

13. Eftir § 31 verður sett nýggj grein § 31 a: "§ 31a**.** Skúlar, ið hava færri enn 50 næmingar, kunnu eftir umsókn frá avvarðandi kommunum og við góðkenning landsstýrismansins verða lagdir saman við einum størri skúla. Samanleggingin kann verða skipað fyri skúlar bæði í somu kommunu og fyri skúlar í tveimum ella fleiri kommunum.

    *Stk. 2.* Skúli, sum verður lagdur niður sbrt. stk. 1. verður tó varðveittur sum undirvísingarstað undir leiðslu av skúlanum, sum hann verður lagdur saman við.
    *Stk. 3.* Áðrenn støða verður tikin til at leggja skúlar saman, skulu skúlastýrini í samanlagda skúlanum hava havt málið til hoyringar.
    *Stk. 4.* Kommunan skipar fyri almennum fundi, har kunnað verður um samanleggingina. Tá ið samstarvið fatar um tvær ella fleiri kommunur, skipa kommunurnar í felag fyri kunningini.
    *Stk. 5.* Hvørt undirvísingarstað sbrt. stk. 2 velur eitt foreldraumboð í skúlastýrið í samanlagda skúlanum."

14. Stk. 10 í § 57 verður orðað soleiðis: "*Stk. 10.* Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri og stuðla royndar- og granskingarverkætlanum, ið hava til endamáls at granska og kanna námsfrøðilig og fyrisitingarlig viðurskifti í fólkaskúlanum. Viðgerð av persónsupplýsingum sbrt. galdandi reglum verður heimilað, tá ið slík viðgerð er neyðug."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingslógaruppskotið er úrslit av tvørpolitiskum arbeiði og aðalorðaskifti í Løgtinginum á heysti 2018, har ymisk øki í fólkaskúlaskipanini eru viðgjørd m.a. árliga skúladagtalið, tíma- og lærugreinabýtið, 10. flokkur, samfelagsfrøði sum kravd lærugrein, undirvísingartímatal í hvørjum árgangi og skúlabygnaður við atliti at skúlaøkjum og skúlasamstarvi millum kommunur. Í hesum arbeiði eru samanberingar gjørdar millum fólkaskúlaskipanirnar í Norðurlondunum. Samanberingarnar vísa, at føroysku næmingarnir hava ein rættiliga langan skúladag. Hetta eru eisini

viðurskifti, sum bæði skúlaleiðarar, lærarar og foreldur hava víst á umframt, at vallærugreinaskipanin í 8. og 9. flokki er sera avmarkað orsakað av, at kravda tímatalið er so høgt. Skúladagatal og lærugreinaskipanin eru ikki við í lógarbroytingunum, tí at heimild er frammanundan í lógini at gera broytingar á hesum økjum. Ásett er í ávikavist § 18, stk. 1 og § 19, stk. 8, at landsstýrismaðurin ásetur skúladagatalið og ger reglur um tíma- og lærugreinabýtið.

Broytingar, sum skotið verður upp at gera, eru í høvuðsheitum:

- at 10. flokkarnir verða skipaðir í sjey samstarvseindir og at ásett verður minsta mark fyri næmingatali í einari samstarvseind. Sum skipanin er í dag, so er einki minsta mark fyri, hvussu nógvir næmingar kunnu vera í einum 10. flokki, og tí fær skúli, sum hevur 10. flokk, játtan til ein heilan flokk uttan mun til, um tað eru ein ella 24 næmingar í flokkinum. Tað hava tí seinastu árini verið 10. flokkar við rættiliga fáum næmingum, heilt niður í ein næming. Í verandi skúlaári hevur minsti 10. flokkurin 2 næmingar, og tað eru fimm 10. flokkar, sum hava færri enn 10 næmingar. Við so lítlum næmingagrundarlagi eru møguleikarnir fyri breytum og felags tiltøkum rættiliga avmarkaðir. Skotið verður tí upp, at 10. flokkarnir verða skipaðir í samstarvseindir og at ásett verður eitt minsta mark fyri næmingatali í samstarvseindini. Undantak verður tó gjørt fyri 10. floks skúla, har høglig farleið ikki er til ein grannaskúla, ið hevur 10. flokk.

- at áseta samfelagsfrøði sum lærugrein í 7. – 9. flokki. Samfelagsfrøði varð í skúlaárinum 2017-18 sett í verk sum ein royndarskipan í hádeild, har byrjað varð í 7. flokki. Tað hevur leingi verið tosað um at fáa samfelagsfrøði sum lærugrein í fólkaskúlanum, og fyri tveimum árum síðani vórðu fyrireikingar gjørdar at skipa lærugreinina. Námsætlan varð gjørd og sjøtul settur á at geva út undirvísingartilfar til samfelagsfrøði í 7. flokki, og hildið er fram við útgávum til samfelagsfrøði í 8. og 9. flokki. Í samfelagsfrøði læra næmingarnir millum annað um fólkaræði, rættindi og skyldur, kommunur, løgting, skúlar og nærumhvørvið. Eisini læra næmingarnir um miðlar, harímillum nýggju miðlarnar sum Snapchat og Instagram, sum tey ungu brúka og hava tørv á at vita meira um og eisini, hvussu tey kunnu verja seg ímóti tí, ið fer fram í ymsu miðlunum. Lærugreinin er væl umtókt, og verður sostatt skotið upp, at samfelagsfrøði verður kravd lærugrein í 7. – 9. flokki.

- at tímatalið í hvørjum árgangi í 1. – 9. flokki verður lækkað. Samanberingar millum undirvísingartímatalið í Norðurlondum vísir, at tímatalið hjá næmingunum í føroysku skúlaskipanini er rættiliga høgt, og at munurin er stórstur í grund- og miðdeild, sum er í 1. - 6. flokki. Tað eru eisini fleiri skúlastjórar, sum vísa á, at hjá summum næmingum er hetta ein bági fyri hugin at læra, tí at skúladagarnir eru langir, og næmingarnir virka troyttir. serliga um tað verður ov nógv av tí sama. Tað eru fleiri orsakir til, at tímatalið er so høgt. M.a. hava vit nógvar tímar í fyrsta fremmandamálinum, sum er danskt, og eftir Pisa undankanningina í 2006 var eitt av átøkunum, at tímatalið í byrjanarundirvísingini varð hækkað munandi frá skúlaárinum 2007/08. Skotið verður upp, at kravda tímatalið í 1. – 9. flokki verður lækkað við tveimum tímum um vikuna. Tímarnir verða tó ikki tiknir úr fólkaskúlaskipanini, men nýttir til onnur undirvísingarlig endamál sum tvílæraraskipan og førleikamenning hjá lærarum.

- at víðka møguleikarnar fyri skúlasamstarvi millum kommunur, serliga sambært § 31 í lógini. Kommunur hava sum høvðusreglu tveir møguleika at skipa skúlasamstarv, antin sbrt. § 27, stk. 1 og 2 í lógini, har næmingar fáa undirvísing í skúla hjá aðrari kommunu ella eftir § 31, stk. 1 og 2, har kommunur heilt ella lutvíst kunnu skipa síni skúlaviðurskifti í felag sum felagsskúlar. Hesi skúlasamstørv verða skipað við sáttmála millum kommunur. Harumframt

hava kommunur sbrt. § 4, stk. 2 og 3 møguleika at skipa samstarv um 10. floks skúla við egnari leiðslu og kunnu eisini sbrt. § 57, stk. 12 skipa skúlasamstarv sum eina royndar- og menningarskipan. Við atliti at skúlasamstarvi eftir § 31, so hava kommunur víst á, at hetta ikki er ein nøktandi skipan, at skúlasamstarvið sbrt. § 31 bara er møguligt, um kommunurnar skipa ein felagsskúla við egnari leiðslu og egnum skúlastýri. Kommunurnar ynskja eina liðiligari skipan, har kommunur í einum skúlasambandi lutvíst skipa síni skúlaviðurskifti, uttan at tað krevst, at tær stovna ein felags skúla við sjálvstøðugari leiðslu og felags skúlastýri. Skotið verður tí upp, at ásetingar verða gjørdar í § 31, sum eisini heimila hesa skipan.

- at møguleiki fyri skúlasamstarvi eisini verður víðkaður til, at ein minni skúli kann verður lagdur saman við einum størri skúla, men at minni skúlin tó verður varðveittur sum undirvísingarstað. Hetta er ein møguleiki at økja um skúlasamstarvið millum størri og smærri skúlar bæði í kommunum og millum kommunur. Mælt verður til, at skipanin fatar um skúlar, sum hava færri enn fimti næmingar, og at lærarnir verða settir í samanlagda skúlanum. Sum skipanin er í dag, so eru smærru skúlarnir sjálvstøðugir skúlar. Hetta ger, at læraratalið er avmarkað, og tí mugu lærarar undirvísa í fleiri lærugreinum, eisini lærugreinum, har teir ikki hava linjulestur. Í samanlagda skúlanum hevur leiðslan møguleika í hvørjum undirvísingarstaði at seta lærarar, ið hava námsfrøðiligan og fakligan førleika í øllum lærugreinunum. Í samanlagda skúlanum hava lærarnir eisini eitt størri fakligt og námsfrøðiligt umhvørvi til fakligt samstarv og menning í sínum arbeiði. Næmingarnir hava eisini betri møguleika fyri at hava samstarv við flokkar í størra skúlanum. Endamálið við at varðveita skúla sum undirvísingarstað er, at veita næmingunum møguleika at ganga í skúla í nærumhvørvinum, serliga í innskúlingini og í miðdeild.

- at greina nærri ásetingina í § 57, stk. 10, sum varð ásett í fólkaskúlalógini við løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007 um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan. Í almennu viðmerkingunum til uppskotið varð m.a. sagt:
  "*Landsstýrismaðurin fær í lógini heimild til at skipa fyri serligum verkætlanum til tess at gera námsfrøðiligar og fyrisitingarligar royndir. Hetta merkir, at sjøtil nú kann setast á veruliga námsfrøðiliga gransking. Tað er ein sannroynd, at vegna vantandi vitan hjá okkum sjálvum, so verða broytingar í skúlaskapi okkara sum oftast grundaðar á vitan og kanningar, sum eru gjørdar aðrastaðni. Við hesari heimildini fer at bera til at bøta um hetta.*" Talan er ikki um eina innihaldsliga broyting, men eina nágreining av endamálinum við ásetingini. Tað hevur verið eitt ivamál, hvat slag av kanningum talan er um, eins og tað hevur verið eitt ivamál, hvørja støðu ásetingin hevur mótvegis reglunum í eitt nú løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

**1.2. Galdandi lóggáva**

Galdandi lóggáva hevur ikki ásetingar um samstarvseindir og um minsta mark fyri næmingatali í 10. flokki, ið er eitt sjálvstøðugt tilboð, sum næmingarnir kunnu velja eftir 9. flokk. Fólkaskúlin er ein 9 ára grundskúli og ein eitt árs 10. flokkur. Tað er bara ein partur av næmingunum, sum heldur fram í 10. flokki, og tí verður næmingatalið í 10. flokki samsvarandi lægri og so lágt í fleiri skúlum, at talan ikki er um ein flokk og eina vanliga undirvísingarstøðu við samspæli og samstarvi millum næmingar.

Sambært galdandi fólkaskúlalóg er samfelagsfrøði ikki kravd lærugrein í føroyska fólkaskúlanum, men er seinastu tvey skúlaárini skipað sum ein royndarverkætlan.

Kravda tímatalið hjá næmingunum í 1. – 9. flokki er ásett í § 19, stk. 2 í fólkaskúlalógini. Tímatalið varð munandi hækkað í tveimum stigum 1. august 2007 og 1. august 2008 eftir Pisa undankanningina í 2006. Hildið verður, at tímatalið er rættiliga høgt, serliga í 1. – 6. flokki samanborið við tímatalið í hinum Norðurlondunum.

Í § 27, stk. 1 og 2 og í § 31, stk. 1 og 2 eru ásetingar um sáttmálar um skúlasamstarv millum kommunur, har næmingarnir antin kunnu ganga í skúla hjá aðrari kommunu ella kommur kunnu skipa ein felagsskúla. Kommunur sóknast eftir eini øðrvísi skipan, har kommunur kunnu skipa undirvísing í felag uttan tó at seta á stovn ein felags skúla við egnari leiðslu og egnum skúlastýri.

Somuleiðis verður sóknast eftir eini skipan, har til ber at leggja smærri skúlar saman við einum størri skúla, sum ikki er møguligt í verandi lóg.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at útvega lógarheimild fyri at áseta samstarvseindir í 10. flokki og minsta mark fyri næmingatali í einari samstarvseind, soleiðis at 10. floks eindirnar ikki verða so smáar, at trupult verður at skipa eina mennandi undirvísingarstøðu bæði við atliti at breytatilboðum, lærugreinavali og fakligum og sosialum undirvísingarátøkum.

At heimild verður fyri at skipa samfelagsfrøði sum kravda lærugrein í 7. – 9. flokki. Tað hevur stóran týdning, at tey ungu m.a. læra um samfelagsviðurskifti og bygnað, skilja týdningin av fólkaræði, og hvussu tey sjálvi eisini kunnu gera sína ávirkan galdandi, og at tey ungu hava kunnleika og innlit í nýggjastu miðlarnar, sum eru frammi í tíðini.

At skapa umstøður fyri einum liðiligari skúlasamstarvi, har kommunur kunnu skipa skúlasamstarv uttan at seta á stovn ein felagsskúla við egnari leiðslu og egnum skúlastýri.

At veita heimild fyri, at kommunur kunnu leggja smærri skúlar saman við einum størri skúla í somu kommunu, og at kommunur eisini kunnu samastarva um at leggja smærri skúlar saman við einum størri skúla. Smáu skúlarnir verða í báðum førum varðveittir sum undirvísingarstøð.

At at lækka kravda tímatalið í 1. – 9. flokki við tveimum tímum um vikuna, tí at skúladagurin hjá næmingunum er rættiliga drúgvur við verandi skipan. Eisini vísa bæði leiðslur og lærarar á, at skipanin við einum høgum tímatali ikki er stimbrandi fyri hugin at læra.

At víðka ásetingina í § 57, stk. 10, so hon eisini fatar um, at landsstýrismaðurin kann stuðla royndar- og granskingarverkætlanir, og at endamálið við verkætlanunum bæði fatar um at granska og kanna.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Ásetingar verða gjørdar um talið av 10. floks samstørvum, og at minsta næmingatal í 10. floks eindunum verður ásett, at heimild verður at skipa samfelagsfrøði sum kravda lærugrein í 7. – 9. flokki, at møguleikar verða fyri einum liðiligari skúlasamsatarvi um skúlasambond millum kommunur, at smáir skúlar kunnu verða lagdir saman við einum størri skúla bæði í kommunum og í samstarvi millum kommunur, men at smáu skúlarnir verða varðveittir sum undirvísingarstøð, at kravda tímatalið í 1. – 9. flokki verður lækkað við tveimum tímum um vikuna og at víðka

ásetingarnar um royndar- og granskingarverkætlanir til, at landstýrismaðurin eisini kanna stuðla verkætlanum, sum fata um bæði at granska og kanna.

**1.5. Hoyringarfundur**

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Uppskotið áleggur ikki landi størri fíggjarligar útreiðslur. Tímatalið hækkar við 2 tímum um vikuna í 9. flokki í sambandi við at skipa samfelagsfrøði sum kravda lærugrein í 7. – 9. flokki. Hinvegin lækkar fíggjarliga útreiðslan til kravdu undirvísingina í 1. – 9. flokki í mun til, at kravda tímatalið lækkar við 2 tímum um vikuna. Eisini lækkar fíggingin til 10. flokk, um samstørv verða skipað í 10. flokki og minsta mark verður sett fyri næmingatali í einari samstarvseind. Útreiðslan til næmingaflutning økist í teimum kommunum, har næmingarnir í 10. flokk fara í skúla í aðrari kommunu.

**2.2. Umsitingaligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingarnar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið kann hava ávirkan á, at eingin 10. flokkur verður í einum skúla, sum frammanundan hevur havt 10. flokk.  Játtanin til einstaka skúlan í samstarvseindini lækkar, tá játtanin ikki verður latin einstaka skúlanum, men samstarvseindini.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið kann hava avbjóðingar fyri næmingar í 10. flokki, sum fara í annan skúla og sostatt skifta undirvísingarumhvørvi. Næmingarnir skuldu samstundis fingið fleiri fakligar og undirvísingarligar valmøguleikar. Leiðsla og lærarar, sum í einstaka skúlanum hava skipað undirvísingina í 10. flokki, fáa ikki framhaldandi hesa avbjóðing at skipa breytir og vallærugreinar á 10. floks stigi, men førleikin verður í samstarvseindini.

**2.7. Millumtjóða sáttmálar á økinum**
Eingir millumtjóða sáttmálar eru á økinum, og tí hevur lógaruppskotið omgar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Eingir tvørgangandi millumtjóða sáttmálar eru á økinum, og hevur lógaruppskotið tí ongar avleiðingar á hesum øki.

**2.9. Marknaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið elvir til marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?

Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin at áseta heimildir í kunngerð. Eisini leggur parturin um skúlasamband millum kommunur um 8. – 10. flokk og aðrar flokkar góðkenningarheimild til landsstýrismanninum í kommunumálum at góðkenna umsitingarliga og fíggjarliga partin í sáttmálum um skúlasambond.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum ella kommunalum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**

Broytingin í § 4, stk. 2 ásetur, hvussu nógvar samstarvseindir skulu verða og minsta mark fyri næmingatali í eini samstarvseind. Skúlarnir, sum hava 10. flokk, samstarva, sum er, um breytir, men hvør skúli í samstarvinum hevur egna játtan. Hetta ger, at stórur munur er á játtanini til skúlar, har 10. flokkarnir eru samskipaðir bæði í Tórshavnar kommunu og í Klaksvíkar kommunu í mun til skipanina, har skúlar samstarva um breytatilboð. Hildið verður ikki, at skipanin, sum er í dag, er nøktandi, m.a. tí at skúlar í fleiri førum hava so lágt næmingatal í 10. flokki, at ikki ber til at skipa tilboð um breytir ella vallærugrein, uttan at tað verður gjørt í samstarvi við annan skúla ella tvørtur um floksstig, har 9. og 10. flokkur eru saman. Hetta ber tó ikki til uttan í einum til tveimum vallærugreinum, av tí at 9. flokkur hevur 28 kravdar tímar um vikuna, og breytaskipan bara er í 10. flokki.

Sum skipanin er í dag, so eru 10. flokkarnir í Tórshavnar Kommunu samskipaðir í eina eind, nevnd Nám X, og somuleiðis eru 10. flokkarnir í Klaksvík samskipaðir, og varð samskipanin gjørd fleiri ár frammanundan, at skúlarnir í Klaksvík vórðu lagdir saman. Flestu av hinum 10. flokkunum samstarva um breytir, men teir eru ikki samskipaðir, og hevur tí hvør skúli í hesum samstørvum egna játtan. Samstørvini eru skipað millum hesar skúlar: Tvøroyar skúla og Vágs skúla, Runavíkar skúla og Tofta skúla, Fuglafjarðar skúla, Stranda skúla og Skúlan við Streymin og millum Skúlan á Giljanesi og Sørvágs skúla. Sandoyar meginskúli er so mikið fjarskotin, at umstøður ikki hava verið fyri regluligum samstarvi við aðrar 10. flokkar. Vestmanna skúli hevur okkurt ár havt samstarv við skúlarnar í Vágum, men ikki regluligt samstarv.

Skotið verður upp, at verandi samstarvsøki verða umskipað til samstarvseindir, sum halda fram í eitt trý ára skeið, galdandi frá 1. august 2019, men at kommunurnar eftir hetta hava møguleika at skipa onnur samstarvsøki í mun til undirvísingartilboð og samfelagsbroytingar sum bústaðarmynstur, undirstøðukervi og kommunuskipan. Mælt verður til, at 10. flokkur í Vestmanna skúla verður samskipaður við antin skúlarnar í Vágum ella við Nám X, og at 10. flokkur í Sandoyar Meginskúla heldur fram sum sjálvstøðug eind, til undirsjóvartunnilin er liðugur, og skúlasamstarv kann verða skipað við eitt 10. floks samstarv t.d. við Nám X. Sostatt verða 10. floks økini sambært hesum: Nám X, 10. flokkur á Skúlatrøð, 10. flokkarnir í Runavíkar skúla og Tofta skúla, 10. flokkarnir í Fuglafjarðar skúla, í Skúlanum við Streymin og í Stranda skúla, 10. flokkarnir í Skúlanum á Giljanesi og Sørvágs skúla og møguliga 10. flokkur í Vestmanna skúla, 10. flokkarnir í Tvøroyrar skúla og í Vágs skúla og Sandoyar Meginskúli verður fyribils sjálvstøðug eind.

**Til § 1, nr. 2**

Kommunurnar samstarva um at skipa samstarvseindirnar og søkja landsstýrismannin um góðkenning. Útgangsstøði verður tikið í teimum sjey økjunum, sum eru í dag, tó verður 10. flokkur í Vestmanna skúla ikki sjálvstøðug eind, men partur av antin 10. floks samstarvinum í Vágum ella av Nám X. Næmingatalið í 10. flokki í Vestmana skúla hevur seinastu fimm skúlaárini verið frá 2 til 13 næmingar. Skotið verður upp, at samstarvseindirnar sbrt. nr. 1 halda fram trý tey næstu skúlaárini frá 1. aug. 2019, so næmingar og foreldur eru trygg við skipanina og vita, hvørja samstarvseind, teirra skúli er partur av. Ynskja kommunur at broyta samstarvseind verður umsókn um hetta send landsstýrismanninum 15. februar árið fyri, at broytingin skal koma í gildi.

**Til § 1, nr. 3**
Heimild verður við hesum veitt fyri, at hóast næmingatalið er lægri enn 15 næmingar, so kann 10. flokkur verða skipaður í teimum kommunum, har næmingar hava langan veg í skúla, ella teir skulu sjóvegis fyri at koma í 10. flokk í øðrum skúla.

**Til § 1, nr. 4, 7 og 12**
Talan er um um tekniskar broytingar í tilvísingum til stk. í somu lógargrein.

**Til § 1, nr. 5**
Broytingin inniber, at samfelagsfrøði verður kravd lærugrein í 7. – 9. flokki. Hildið verður, at tað er umráðandi, at næmingar fáa umstøður at ogna sær innlit og vitan um samfelagsviðurskifti bæði í Føroyum og uttanlands. Tey ungu eiga framtíðina, og ein av uppgávunum hjá fólkaskúlanum er at búgva næmingarnar til virkna luttøku í samfelagslívi sum heild bæði við atliti at arbeiði og læring. Harumframt at kenna ymsu samskiftismiðlarnar og demokratisku meginreglurnar og hava førleika at verða partur av almenna orðaskiftininum.

**Til § 1, nr. 6**
Skotið verður upp at lækka kravda undirvísingartímatalið í grundskúlanum í 1. – 9. flokki. Næmingarnir í føroyska fólkaskúlanum hava fleiri tímar samanborið við hini Norðurlondini. Skúladagurin er rættiliga drúgvur, umframt at stórur partur av skúlatíðini fatar um kravdar lærugreinir. Næmingarnir hava ofta ilt við at hugsavna seg seinastu tímarnar, og av tí at so at siga allir tímar eru í kravdum lærugreinum, so hava næmingarnir fáar møguleikar at velja lærugreinir og evni í mun til áhuga og førleika. Við atliti at hesum er neyðugt at endurskoða tíma- og lærugreinabýtið. Mælt verður til, at landsstýrismaðurin heitir á Fólkaskúlaráðið ella setur ein arbeiðsbólk umboðandi Mentamálaráðið, lærarar og leiðslur at gera uppskot um broytingar í tíma- og lærugreinabýtinum. Tímajáttan, sum verður tøk, eftir at tímatalið er lækkað, verður nýtt til undirvísingarlig endamál í fólaskúlanum, so at umstøður verða fyri m.a. tvílæraraskipan, menningarátøkum og førleikamenning hjá lærarum og skúlaleiðarum.

**Til § 1, nr. 8**
Skotið verður upp, at møguleiki verður hjá kommunum at skipa skúlasamband, uttan at tær skula stovna ein felagsskúla við egnari leiðslu og egnum skúlastýri, men at skúlasambandið kann nýta ein av verandi skúlum, har undirvísingin verður skipað.

**Til § 1, nr. 9**
Skotið verður upp, at leiðarin í skúlanum, har næmingarnir í skúlasambandinum skulu ganga, eisini verður leiðari fyri skúlasambandið. Mett verður, at umráðandi er, at tað verður sama leiðsla fyri allan skúlan.

**Til § 1, nr. 10**
Skotið verður upp, at kommunurnar í skúlasambandinum gera sáttmála og velja eitt stýri fyri skúlasambandið, so at ávikanin og leikluturin hjá kommunum í skúlasambandinum verða tryggjað. Skotið verður upp, at stýrið umsitur fyrisiting og raksturin hjá skúlasambandinum.

**Til § 1 nr. 11**
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum góðkennir undirvísingarliga partin, og landsstýrismaðurin í kommunumálum góðkennir umsitingarliga og fíggjarliga partin í sáttmálum

um skúlasambond til tess at tryggja, at skúlasambandið lýkur lógarásetingar, og at ávirkanin og ábyrgdin hjá kommununum verður greið.

**Til § 1 nr. 13**
Skotið verður upp, at ásetingar verða gjørdar í lógini, so tað ber til hjá kommunum at leggja smærri skúlar saman við einum størri skúla. Skúlasamalegging kann fata um skúlar í somu kommunu og eisini um skúlasamstarv millum tvær ella fleiri kommunur. Lærarnir verða settir í samanlagda skúlanum. Leiðslan skal tryggja, at tað altíð er ein ábyrgdarpersónur knýttur at hvørjum undirvísingarstaði, og at lærarar, alt tað ber til, verða settir at undirvísa í teimum lærugreinum, har teir hava besta fakliga og námsfrøðiliga førleikan.

Skotið verður upp, at smáu skúlarnir, sum verða lagdir saman við einum størri skúla, verða varðveittir sum undirvísingarstøð. Skúlamyndugleikin á staðnum, sum er kommunustýrið og skúlastýrið, ger av, hvørjir flokkar verða í hvørjum undirvísingarstaði.

Skúlastýrini í avvarðandi skúlum bæði í smærru skúlunum og stóra skúlanum verða hoyrd, áðrenn stig verða tikin til at leggja skúlarnar saman. Kommunustýrið skipar harumframt fyri borgarafundi, har kunnað verður um ætlanina og endamálið við samanleggingini. Fatar samanleggingin um skúlar í tveimum ella fleiri kommununum, skipa kommunurnar í felag fyri kunningini.

Skotið verður upp, at foreldur at næmingum í einum minni skúla, sum verður lagdur saman við einum størri skúla, velja eitt foreldraumboð í skúlastýrið í samanlagda skúlanum. Tá ið fleiri enn tveir skúlar verða lagdir saman við einum størri skúla, ger kommunan ella kommunurnar eina skiftisskipan um foreldraumboðanina frá smærru skúlunum í skúlastýrinum. Um so er, at kommunurnar ikki kunnu semjast um eina skiftisskipan, tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum

Foreldraumboðini úr minnu skúlunum eru umframt foreldraumboðini, sum verða vald sbrt. § 50, stk. 2, pkt. 2.

**Til § 1, nr. 14**
Skotið verður upp at gera hesa broyting, so tað verður greiðari, at talan er um gransking og royndir, ið lúka tey etisku og fakligu krøv, ið vanliga verða sett til slíkar verkætlanir. Harumframt skal verkætlanin fáa til vega vitan, ið kann nýtast í møguligum tiltøkum, ið skulu betra um og menna føroyska fólkaskúlan.

Landsstýrismaðurin fær heimild til bæði at gera avtalu við uttanhýsis granskingarstovn og at seta fólk í verkætlanarstørv við tí endamáli at granska og gera royndir innan fólkaskúlaøkið. Landsstýrismanninum verður eisini heimilað at veita stuðul til granskingar- og royndarverkætlanir, ið landsstýrismaðurin metir, kunnu nøkta henda tørv. Ásetingin setur tó ikki á stovn nakra beinleiðis skipan, ið granskarar kunnu søkja stuðul frá.

Verkætlanir sbrt. hesi áseting skulu, har tað er viðkomandi, fylgja reglunum um viðgerð av persónsupplýsingum, og ásetingin skal skiljast sum nøktandi heimildargrundarlag fyri viðgerð av persónsupplýsingum, tá ið slíkt heimildargrundarlag er neyðugt sambært galdandi reglum.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Mentamálaráðið, xx. desember 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**+Fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Fundarfrásøgn frá hoyringarfundi